SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg minnist einki til, at nakar bleiv píndur í mínari forsetatíð*

*(Augusto Pinochet)*

# USA vil hava eftirlit við rúmdini

**USA ætlar sær at nokta fíggindaliga sinnaðum londum atgongd til rúmdina, og USA fer ikki at skriva undir nakran sáttmála, sum skerjir landsins rásarúm í rúmdini**



*Tekningin vísir, hvussu ein fylgisveinur við laservápnum kann skjóta eina langtberandi rakett niður, so skjótt hon er skotin út.*

Tað er í stuttum niðurstøðan í einum nýggjum skjali um amerikanska politikkin í rúmdini. Skjalið, sum ber heitið ”National Space Policy”, varð lagt út á heimasíðurnar hjá myndugleikunum fyri nøkrum døgum síðani, uttan at nakar bleiv kunnaður um tað. Tí hevur eingin givið sær far um innihaldið, fyrr enn blaðið The Washington Post viðgjørdi tað í gjár.

### Munur á skjølum

Sambært blaðnum heldur Bush-umsitingin uppá, at skjalið er bara ein dagførd útgáva av tí rúmdarskjalinum, sum Bill Clinton kunngjørdi í 1996, og at ætlanin er ikki at gera rúmdina til eitt hernaðarøki. Men The Washington Post vísir á, at munur er á teimum báðum skjølunum.

Í fyrsta lagi leggur tað nýggja skjalið nógv størri dent á trygdarpolitisk viðurskifti í rúmdini. Fýra av teimum seks pørtunum snúgva seg um trygd. Í skjalinum hjá Clinton-stjórnini vóru tveir av fimm pørtum um trygdarviðurskifti.

Í øðrum lagi legði skjalið hjá Clinton-stjórnini dent á, at USA eigur at fylgja altjóða sáttmálum um rúmdina, tá tað snýr seg um trygdarspurningar. Tað nýggja skjalið sigur beint tvørturímóti, at USA fer at seta seg upp ímóti øllum tiltøkum, sum kunnu avmarka landsins møguleikar at brúka rúmdina.

Í triðja lagi segði tað fyrra skjalið, at USA skuldi halda altjóða sáttmálar, sjálvt um tað kundi koma upp á tal at forða fíggindaliga sinnaðum kreftum at brúka rúmdina. Í tí nýggja stendur, at USA metir rúmdina hava stóran týdning fryri landsins áhugamál og er til reiðar at forða fíggindaliga sinnaðum kreftum at brúka rúmdina ímóti landsins áhugamálum.

### Nýtt mál

- Innihaldið í tí nýggja ”National Space Policy” vísir, at USA er til reiðar at ganga egnar leiðir í rúmdini og serliga á tí hernaðarliga økinum, skrivar Therese Hitchers á heimasíðuni hjá tí óhefta stovninum Center for Defence Information, har hon er stjóri.

Hon heldur, at tað ágangandi orðalagið í tí nýggja skjalinum gloppar dyrnar fyri at brúka rúmdarvápn til at beina fyri fylgisveinum, ið kunnu metast at hava fíggindaliga sinnað áhugamál. Bush-stjórnin avsannar fyri The Washington Post, at hon hevur ætlanir um at menna nýggj rúmdarvápn, men minni enn so øll hava álit á hesum, skrivar blaðið.

- Politikkurin hjá Bill Clinton gloppaði dyrnar fyri rúmdarvápnum, men stjórnin gjørdi ongantíð nakað við tað. Politikkurin hjá Bush fer longri enn so, sigur trygdarserfrøðingurin Michael Krepon á stovninum Henry L. Stimson Center við The Washington Post.

### Kina er við

Fyri trimum vikum síðani skrivaði tíðarritið Defence News, at kinesarar hava ment eitt nýtt laservápn, sum kann gera amerikonskar njósnarafylgisveinar nyttuleysar við at gera teir blindar, sum tikið varð til. Sambært tíðarritinum hava kinesararnir longu brúkt hetta vápnið fleiri ferðir, tá amerikanskir njósnarafylgisveinar hava verið uppi yvir kinesiskum øki.

Amerikanarar hava umhugsað at fáa sær tilsvarandi vápn, og eygleiðarar siga við The Washington Post, at tað er einki at ivast í, at USA er í ferð við at menna vápn, sum kunnu brúkast úti í rúmdini.

USA brúkar rúmdartøkni í sínari krígsførslu í dag og er langt framman fyri øll onnur lond á tí økinum. Tað er helst eisini orsøkin til, at amerikanska stjórnin hevur sett seg upp ímóti ætlanum hjá ST at orða ein nýggjan sáttmála um, hvussu rúmdin kann brúkast til hernaðarlig endamál, skrivar The Washinton Post.

# Seks ára gamal drongur sporleyst horvin

**Týska løgreglan leitar eftir einum seks ára gomlum drongi, sum hvarv, tá mamma hansara doyði í einari ferðsluvanlukku**

Mamman, sum var 41 ára gomul, doyði, tá bilur hennara fór út av vegnum í Vogelberg í landslutinum Hessen fyrramorgunin. Løgreglan sigur, at bilurin hevði ov nógva ferð, og løgreglan heldur, at kvinnan koyrdi útav við vilja fyri at taka lívið av sær.

Tá løgreglan stutt eftir vanlukkuna kunnaði næstringarnar hjá kvinnuni um vanlukkuna, fekk hon at vita, at kvinnan átti ein seks ára gamlan son. Tað vísti seg, at hann var ikki við hús, og enn hevur eingin borið eyga við hann.

- Tað er ikki óhugsandi, at mamman hevur tikið sonin við sær í deyðan, skrivaði løgreglan í Hessen í einum tíðindaskrivi í gjár.

Løgreglan veit ikki, um tann seks ára gamli Marvin var í bilinum saman við mammuni, ella um hon hevði biðið okkurt vinfólk hava hann. Hann var í hvussu er ikki í bilinum, tá løgreglan kom fram á vrakið, og tí verður hildið, at hann kanska slapp livandi frá vanlukkuni, og at hann er vilstur í skóginum, skrivar blaðið Die Welt.

Í gjár vórðu meiri enn 300 fólk sett at leita eftir dronginum, men hóast tey høvdu bæði tyrlur og servandar hundar at hjálpa sær, sóu tey einki til drongin. Í morgun skuldu kavarar fara at leita í áum og vøtnum nærhendis vanlukkustaðnum.

## STUTT SAGT

### Pinochet minnist ikki

Fyrrverandi kilski einaræðisharrin Augusto Pinochet vil vera við, at hann dugir ikki at minnast, at fangar vóru fyri ágangi í Villa Grimaldi-fongslinum tey árini, hann ráddi fyri borgum í Kili. Í einum brævi til rættin skrivar Pinochet, at hann minnist einki slíkt, og skuldi tað kortini verið satt, so hevur hann í øllum førum ikki ábyrgdina, skrivar hann. Tann 90 ára gamli fyrrverandi einaræðisharrin er skuldsettur fyri 59 tilburðir um burturflyting og píning.

### Kunnu fáa deyðadóm

Tveir amerikanskir hermenn, sum eru ákærdir fyri at hava myrt eina 14 ára gamla gentu og familju hennara í mars í ár, kunnu fáa deyðarevsing, verða teir funnir sekir. Teir báðir eru eisini ákærdir fyri at hava neyðtikið ta 14 ára gomlu gentuna, áðrenn teir skutu hana. Seks aðrir amerikanskir hermenn eru ákærdir í sama máli, men teir kunnu ikki fáa deyðarevsing. Í einum øðrum føri eru fýra hermenn ákærdir fyri at hava myrt tríggjar irakar.

### Stjóru bilin

Borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, iðrar seg um, at hann í gjár gjørdi av at læna einum av sínum hjálparmonnum borgarstjórabilin til eini ørindi. Mitt í einari gøtu leyp ein kvinna út á vegin, steðgaði bilinum og vildi hava pengar frá hjálparmanninum. Hann segði nei, men áðrenn hann varnaðist nakað, fekk hann eitt slag í høvdið og bleiv skumpaður út úr bilinum. Nakrar tímar seinni fann løgreglan Lexusbilin hjá Bloomberg, men tjóvurin var ikki at síggja.